tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Ov langt, harra løgmaður

## *Oddagrein*

Mangur maður var bilsin, nú ein faldari frá Føroya Landsstýri datt inn á gólvið hjá øllum føroyskum húsarhaldum. Sagt verður, at hettar er ein kunningarfaldari, ið skal gera føroyingar betri fyri at taka støðu í fullveldismálinum. Um hettar er ein reaktión uppá, at veljarakanningar tykjast venda fullveldinum bakið, sigur faldarin einki um, men ivasamt er tað, at politiserandi argumentatión frá landsins hægsta stað verður rópt kunning.

Sagt verður í innganginum, at faldarin skal bøta um førleikan hjá fólki at kjakast um og taka støðu til fullveldismálið. Hevði talan verið um ein fakliga vælgrundaðan faldara við sjónarmiðum frá eitt nú øllum politiskum flokkum, so hevði kanska verið eitt sindur av meining í at sent hann í hvørt hús. Lat tað verða sagt beinanvegin, at faldarin er ikki eitt skjal, ið lýsir fullveldismálið frá fleiri síðum. Faldarin er eitt politiskt rit, ið ikki átti at verið sent fyri skattgjaldarnas pening. Um Tjóðveldisflokkurin Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin velja at senda slíkt einsíðugt tilfar út, so eiga teir at gera tað sum flokkar og ikki senda tað út sum eitt fakligt dokument frá Føroya Landsstýri. Flokkar fáa pening til politiska upplýsing, og demokratiskt er tað óforsvarligt, um politiskir flokkar, útyvir politiska upplýsing, senda síni manifest út fyri skattgjaldarans pening.

Fólk flest eru óivað væl og virðiliga før fyri at taka støðu í fullveldismálinum, og tað vísir seg eisini, at tað gera tey. Trupulleikin hjá samgonguni er bert, at fólk flest tykjast ivast í fullveldinum. At leggja upp til, at fólk ivast, tí tey ikki eru nóg væl kunnaði, er at undirmeta veljaran.

Ein trupulleiki við sokallaða kunningararbeiðnum hjá samgonguni er, at samgongan ikki vil viðganga, at eitt nú búskaparparturin í Hvítubók er ov tunnur. Íslendsku útrokningarnar, ið komu aftaná, og viðmerkingar frá búskaparfrøðingum, harav onkur teirra var partur av arbeiðinum, hava ikki verið tiknar til eftirtektar, og tí er trúvirðið á hesum arbeiði viknað. Búskaparparturin í Hvítubók hevur styttstu skiftistíð í sínum roknistykkjum at vera 15 ár. Hvat ger landsstýrið? Ístaðin fyri at at seta seg aftur at rokna, sum rætt var, so gongur samgongan framvegis og letur sum einki og fyrigyklar fólki, at búskaparparturin í Hvítubók fortelur alt, sum er vert at vita, um búskaparligt sjálvbjargni. Hettar er, uttan at taka munnin ov fullan, rættiliga langt frá veruleikanum. Hví skavar landstýrið ikki allar føroyskar búskaparfrøðingar saman — eisini ella kanska serliga teir, ið búgva uttanlands — og fær eitt breitt óheft fakligt kjak, uttan at Høgni Hoydal fer í bløðini at kunngera ratur og annað hjá fólki, ið ditta sær at tala ímóti politikki landstýrisins.

At løgmaður er samdur í at senda slíkt tilfar út, kemur óvart á okkum. Hvussu langt ber til at fara í einsíðuðari argumentatión í fullveldismálinum? Vit hava havt meira og minni pínligar kunningarfundir í Danmark, umsitingin hevur verið nógv nýtt til hettar einsíðuga arbeiði, ein heimasíða hjá Landstýrinum, ið fyri ein stóran part inniheldur politiskar greinar, ið somuleiðis skal eitast at vera kunnandi, er gjørd fyri skattgjaldarans pening og nú kemur so hesin indoktrinerandi faldarin fyri skattgjaldarans pening. Eftir okkara tykki er farið ov langt, harra løgmaður!

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Stuðlið bíbiltrúgvu prestunum

Í Sosialinum um dagarnar síggja vit grein um fólkakirkju okkara. Sagt verður frá, at nú hava prestarnir í tveimum sóknum - Bergur, Niels Pauli og Hans Eiler - sagt bispi frá, at teir ikki vilja hava danskar bispar at tala í kirkjunum í teirra sókn á hvítusunnu. Hetta við teirri grund, at hesir bispar niðri frá halda, at tað er púra rætt at geva kirkjuliga signing yvir, at menn giftast við monnum og kvinnur við kvinnum. Bíblian talar greitt ímóti hesum í Rómverjabrævinum kapitul 1, frá ørindi 24 og út.

Góðu føroyingar! Tað er mangan vanligt millum manna, tá ið tosið kemur inn á fólkakirkju okkara, at prátið altíð gongur ímóti teimum, sum vilja halda fæst við bíbliu okkara, tá ið onnur vilja strika ymiskt í henni. Sosialurin - stórsta tíðindablað okkara - tekur eisini altíð part við tí liberala partinum av fólkakirkju okkara. Liberala partinum, her hugsi eg um tey, sum ikki vilja boyggja seg fyri, hvat bíblian sigur í øllum lutum, men gera seg sjálv dómarar yvir, hvat í bíbliuni tey halda, vit skulu brúka, og hvat vit bara skulu lata eyguni aftur fyri. Sjálvt um bíblian talar greitt um hetta. Hetta sóu vit so sjónliga, tá ið málið um Peter O. K. Olofson var frammi. Tá vildi øll hava hann har pippari grør, eisini Sosialurin.

Vit vanligu menniskju vera lættliga ávirkað av, hvat bløðini og tey flestu siga og halda. Men góðu føroyingar! Latum okkum stuðla Bergi, Niels Paula, Hans Eiler og kirkjuráðum teirra í hesum málinum, um at teir ikki vilja loyva bispum at tala í kirkjum okkara, bispum, ið játta monnum at giftast við monnum, sjálvt um hetta stríðir beint ímóti bíbliubók okkara. Latum okkum stuðla teimum, tá ið prátið kemur inn á teir í gerandisdegi okkara. Tí tey flestu vilja tosa ímóti teimum. Tey siga, at teir bara vilja stríð í kirkju okkara.



Men hygg eftir tí bíbliuteksti, eg sipaði til í áðni - hann stendur á síðu 192 í Nýggja Testamenti í bíbliutýðing hjá Fólkakirkjuni. Prestar skulu vera orðsins tænarar. Luther - tann sum byrjaði fólkakirkju okkara, og sum vit hálova - segði „Skriftin aleina!“.

Men, landsmaður mín! Ikki alt fyri frið skuld. Hugsa tær ein boksidyst, har reglurnar vóru, at alt fyri frið skuld? Lítið skil hevði verið í. Somuleiðis við fólkakirkju okkara. Um vit vilja halda menniskjaligan frið og vera fólkalig fyri ein og hvønn prís, so fær tað eisini óhugnaligar fylgir fyri fólkakirkju okkara. Um vit heldur vilja strika ymiskt í bíbliubók okkara av og á, bara fyri at tað skal vera friðarligt.

Hvar endar fólkakirkja okkara so. Vit bíbiltrúgvu missa áhugan fyri fólkakirkjuni og stovna okkara egna. Og Gud vil ikki vera til staðar við orði sínum í tí gomlu fólkakirkjuni, tí orðið er ikki har meir. Orðið er skift út við menniskjalig ævintýr.

Góðu Bergur, Niels Pauli, Hans Eiler og kirkjuráð tykkara! Mín stuðul hava tit 100%. Og alt tað besta, og haldið fram við at vera tænarar orðsins - og ikki rænarar orðsins, sum aðrir eru!

**Vinarliga**
**Gimmi Olsen**
**Klaksvík, tlf. 456004**

# Klaksvíkar Hornorkestur fimti

Vikuskiftið, hin 5. og 6. mei, hátíðarhelt Klaksvíkar Hornorkestur sín 50 ára stovningardag. Hetta varð m.a. gjørt við eini jubileums konsert í Ósaskúlanum. Konsertin var afturlítandi, við tað at her vóru spæld verk, sum orkestrið hevur spælt hesi 50 árini.

Skráin var fjølbroytt og áhugaverd. Orkestrið legði fyri við at spæla Klaksvíkar marsjin eftir Norman Edvards. Hesir tónar vóru, frá fyrstu løtu, við til at geva konsertini ein dám av gleði og fagnaði.

Eitt av hæddarpunktunum á konsertini var kenda verkið »Carneval de Venice« sum W. Rimmer hevur gjørt. Hetta verk setur krøv, bæði til spælarar og ikki minst til solist. Her spældi cornet-snillingurin Eiler Rasmussen solo. Sum so mangan áður, bergtók Eiler Rasmussen áhoyrarnar við sínum spæli. Eftir lokið avrik rungaðu lógvabrestirnir í høllini og blómurnar frá abbadøturunum vóru av sonnum uppibornar. Eiler Rasmussen er ikki bara framúr fimur á sínum ljóðføri. Hansara fraseringar eru eisini vælgerandi og so hevur hann ein heilt serstakan »tóna«. Ein sera vakran og kenslubornan tóna, sum smittar av uppá hinar spælararnar, og er við til at geva Klaksvíkar Hororkestri sál.

Á skránni vóru eisini »Mær leingist at fevna teg grønkandi vár« við lagi eftir Knút Olsen og lagið til



Óluvu-kvæðið (»Stígum fast«) sum danska tónaskaldið Henrik Rung upprunaliga teknaði upp. Hesi løg vóru við til at geva konsertini ein heimligan dám.

Eitt annað hæddarpunkt á Jubileums-konsertini hjá Klaksvíkar Hornorkestri var »Grandfathers Clock«. Her spældi Rani Hansen euphoniums solo. Hetta var eingin løtt uppgáva. Men spælið hjá Rana var sannførandi, og merkt av dugnaskapi.

Samanumtikið kann sigast, at Klaksvíkar Hornorkestur, við Sharon Fisher sum leiðara, kom væl frá konsertini. Ljómurin var hugtakandi og spælið var í síni heild merkt av neyvleika.

Undir konsertini vóru heiðursbrøv handað tveimum av limunum fyri drúgva og trúgva tænastu, nevniliga Sáman Christiansen og Otto Samuelsen. Teir hava spælt við í orkestrinum, líka síðani tað varð stovnað. Gullnálir vóru eisini handaðar teimum, sum hava spælt við í tjúgu ár. Hetta var alt samalt við til at geva konsertini ein serstakan dám.

Tað er eingin ivi um, at Klaksvíkar Hornorkestur telist millum tey fremstu í landinum. Klaksvíkar Hornorkestur hevur spælt seg inn í hjørtuni mong. Hugaligt at síggja, at eisini ungar kreftir eru við í orkestrinum. Tað grør um gangandi fót!

Takk fyri eina góða konsert og tillukku við teim fimti!

**Meinhard Bjartalíð**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara elskaði maður og pápi

**KAJ ELI J. EYVINDSSON**
Trongisvágur

so brádliga doyði og varð jarðaður.

Tøkk øll tit, sum komu inn á gólvið, tøkk fyri blómur og brøv, fyri uppringingar og heilsanir.

Tøkk til prest og talarar í kapellinum og í kirkjuni, fyri vakurt spæl í kirkjuni og tøkk til øll tykkum, sum á nógvan ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini og við ervinum.

Tøkk fyri allar minnisgávurnar til børnini.

Tøkk tit mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

Tøkk fyri forbøn. Harrin signi tykkum øll.

**Astrid, Kristina og Margreta**



# Skiftistíðin verður fýra ár

*Danska stjórnin fer á komandi samráðingarfundi um ríkisrættarligu støðuna at halda fast um eina skiftistíð á fýra ár. Hetta gjørdi forsætisráðharrin greitt á fundi í gjár við serligu fólkatingsnevndina, ið fylgir samráðingunum*

JOHN JOHANNESSEN

Føroyingar skulu ikki vænta sær eina skiftistíð, ið verður longur enn fýra ár. Heldur ikki skulu vit vænta okkum at fáa størri rættindi í Danmark enn aðrir norðurlendingar, fara vit út út ríkisfelagsskapinum.

Hetta gjørdi danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, enn einaferð greitt, tá hann í gjár var á fundi við serligu fólkatingsnevndina, ið fylgir ríkisrættarligu samráðingunum millum Føroyar og Danmark.

Poul Nyrup Rasmussen segði, at eru føroyingar ikki til reiðar at taka undir við eini búskaparligari skiftistíð á fýra ár, eiga teir at gevast við at samráðast um fullveldi.

Eisini vísti forsætisráðharrin á, at tað er púra burturvið, tá løgmaður tosar um at útseta ígildiskomuna av einum nýggjum ríkisrættarligum sáttmála.

### Endurtøka av tíðindafundinum

Annars var fundurin við Føroya nevndina mest ein víðkað endurtøka av tí, forsætisráðharrin segði á tíðindafundinum beint eftir samráðingarfundin 2. mei.

Forsætisráðharrin vísti nevndini á fýra punkt, sum torført verður hjá pørtunum at finna semju um. Hesi fýra punktini vóru skiftistíðin, sjálvur sáttmálaformurin, spurningurin á hvønn hátt danir skulu umsita mál fyri føroyingar, eftir teir eru farnir úr ríkisfelagsskapinum og at enda spurnigurin um sjálvan ríkisfelagsskapin.

Føroysku fólkatingsumboðini, Óli Breckmann og Jóannes Eidesgaard, vóru við sum eygleiðarar, tá danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, beint eftir døgurða í gjár fór á fund við 21 manna fólkatingsnevndina. Hetta var annar fundurin, serliga fólkatingsnevndin higartil hevur hildið.

### Vald eftir spurnarorðaskiftið

Tað var eftir spurnarorðaskiftið á fólkatingi um ríkisrættarligu støðu Føroya, at tað varð samtykt at seta eina fólkatingsnevnd at fylgja samráðingunum. Nevndin skal vera eitt slag av ráðgeva hjá stjórnini bæði áðrenn og eftir samráðingarfundirnar við landsstýrið. Umframt hetta skal nevndin eisini syrgja fyri, at stjórnin ikki ger nakað undir samráðingunum, sum hon ikki hevur meiriluta fyri í Fólkatinginum.

Peter Duetoft úr Centrum-Demokratunum, sum er formaður í nevndini, heldur, at nevnin kann tryggja ein samráðingaranda, ið er betur enn tann, vit upplivdu undir fyrsta samráðingarfundinum 17.mars.

Teir 21 limirnir, ið manna nevndina eru: Jan Petersen frá Sosialdemokratunum, Pernille Blach Hansen frá Sosialdemokratunum, Dorte Bennedsen frá Sosialdemokratunum, Ole Løving Simonsen frá Sosialdemokratunum, Per Kaalund frá Sosialdemokratunum, Hans-Pavia Rosing, Jens Lunde frá Socialitisk Folkeparti, Aage Frandsen frá Socialistisk Folkeparti, Peter Duetoft frá Centrum-Demokratunum, Elisabeth Arnold frá Radikale Venstre, Jette Gottlieb frá Eindarlistanum, Anders Fogh Rasmussen frá Vinstra, Ulla Tønnes frá Vinstra, Christian Mejdahl frá Vinstra, Pia Larsen frá Vinstra, Bendt Bendtsen frá Koservative Folkeparti, Per Stig Møller frá Konservativ Folkeparti, Pia Kjærsgaard frá Dansk Folkeparti, Peter Skaarup frá Dansk Folkeparti, Jan Sjursen frá Kristelig Folkeparti og at enda Kirsten Jacobsen frá Frihed 2000.



*Føroyski fólkatingsmaðurin, Óli Breckmann úr Fólkaflokkinum, var við á fundinum sum eygleiðari. Her prátar hann við formannin í Føroyanevndini, Peter Duetoft úr CD-*
**Mynd: Føroyska Tíðindastovan**



*Jóannes Eidesgaard, fólkatingsmðaur úr Javnaðarflokkinum, hittir Poul Nyrup Rasmussen eftir fundin í Føroyanevndini seinnapartin í gjár*
**Mynd: Føroyska Tíðindastovan**

# Skal gera upplegg til landsstýrið um Postverkið

*Á landsstýrisfundinum mánadagin varð gjørt av, at Vinnumálastýrið skal gera eitt upplegg til eina loysn á postverksmálinum. Sum skilst verður nú sæð burtur frá at gera Postverkið til partafelag*

JOHN JOHANNESSEN

Vinnumálastýrið arbeiðir í løtuni av øllum alvi fyri at finna eina loysn á peningaliga trupulleikanum hjá Postverki Føroya. Og sum skilst, verður loysnin ikki, at stovnurin verður gjørdur um til partafelag, eins og landsstýrismaðurin í vinnumálum hevði ætlað.

Fyri lítlari viku síðani kom alment fram, at kassin hjá Postverkinum er púra tómur, og at virksemið hjá stovninum steðgar innan tríggjar mánaðir, fær Postverkið ikki hjálp frá almenna mundugleikanum.

Lansstýrismaðurin í vinnumálum, Finnbogi Arge, gjørdi tá greitt, at hann ikki ætlar sær at biðja tingið um eykajáttan, fyrr enn hann er vísur í, at bygnaðurin fyri stovnin verður broyttur, so Postverkið gerst alment partafelag.

Nú letur kortini til, at landsstýrismaðurin hevur slept hesi støðu, eftir at partur av samgonguni, nevniliga Tjóðveldisflokkurin, hevur gjørt púra greitt, at hann als ikki kann taka undir við, at Postverkið verður privatiserað.

### Drúgv politisk viðgerð

Í oktober í fjør kunnaði postverksstjórin, Bergur í Garði, landsstýrismannin í vinnumálum um, at tað stóð illa til hjá Postverkinum, og at støðan fór at gerast hættislig í vár.

Síðani tá hevur Postverkið fleiri ferðir verið viðgjørt í landsstýrinum. Men eingin loysn er funnin, tí landsstýrið hevur verið rúkandi ósamt um, hvussu trupulleikin hjá Postverkinum skal loysast.

Veruliga bumban brast, tá postverksstjórin fyri einari viku síðani boðaði Finnboga Arge, landsstýrismanni, frá, at úrslitið fyri tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár var so vánaligt, at kassin hjá Postverkinum er púra tómur í august.

Hetta gjørdi, at ferð kom á politisku viðgerðina, og á landsstýrisfundinum mánadagin varð gjørt av, at Vinnumálastýrið skal gera eitt upplegg til eina loysn. Hetta uppleggið skal leggjast fyri landsstýrið í næstum.

### Líkjast Post-Danmark

Tað letur til, at Finnbogi Arge hevur tikið Tjóðveldisflokkin, ið als ikki góðtekur, at Postverkið verður privatiserað, til eftirtektar. Nógv bendir á, at uppleggið, Vinnumálstýrið í løtuni arbeiðir við, gongur út uppá at broyta bygnaðin fyri Postverkið soleiðis, at tað kemur at líkjast bygnaðinum hjá Post Danmark. Hetta er ein millumloysn, ið Tjóðveldisflokkurin hevur mælt til.

Postverksstjórin hevur áður víst á, at vit mugu fáa eina skipan, ið inniber, at Postverkið í størri mun kann arbeiða sum eitt sjálvstøðugt felag. Hann vísir í hesum sambandi á, at Postverk Føroya er einasta felag í Norðurlondum, ið ikki arbeiðir sum eitt sjálvstøðugt felag, men harafturímóti er heft at politiska myndugleikanum.

Um tað fer at eydnast at finna ein loysn á trupulleikanum hjá Postverkinum áðrenn tað verður noytt at steingja, veit Finnbogi Arge ikki at siga. Men hann vísir á, at arbeitt verður av øllum alvi fyri at finna eina loysn sum skjótast.

